Umhvørvis- og vinnumálaráðið

Løgtingið

Dagfesting:	29. september 2020
Mál nr.:	20/00161
Málsviðgjørt:	ARØ
Eftirkannað:	24. september 2020

Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barsilsskipan (Barsilslógin)
(Leinging av rættinum til barsilspening, hækking av barsilsgjaldinum og broyting viðvíkjandi kærunevndini)

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barsilsskipan (Barsilslógin)
(Leinging av rættinum til barsilspening, hækking av barsilsgjaldinum og broyting viðvíkjandi kærunevndini)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 48 frá 3. apríl 2001 um barsilsskipan (Barsilslógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 56 frá 7. mai 2019, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 1, stk. 3, 2. pkt. verður aftan á "§ 9, stk." sett: "6 og".

2. Í § 9, stk. 1, 2. pkt. verður "44 vikur" broytt til: "48 vikur".

3. Í § 9, stk. 2, 1. pkt. verður "30 vikur" broytt til: "34 vikur".

4. Í § 9, stk. 4, 1. pkt. verður "48 vikur" broytt til: "52 vikur".

5. Í § 9, stk. 6 og 7 verður "30 vikunum" broytt til: "34 vikunum".

6. Í § 19, stk. 1 og 4 verður "0,71%" broytt til: "0,86%".

7. Yvirskriftin yvir § 25 verður orðað soleiðis:

"*Umsitingarmyndugleiki og kærur*"

8. § 25, stk. 3 og 4 verða strikað.
Stk. 5 verður eftir hetta stk. 3.

9. Aftan á § 25 verður í kapittul VIII sett:

"**§ 25 a.** Avgerðir eftir hesi løgtingslóg ella eftir reglum, settum sbrt. løgtingslógini, kunnu kærast til kærunevndina hjá

Arbeiðsloysisskipanini og Barsilsskipanini innan 4 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið fráboðanina um avgerðina. Avgerðir hjá kærunevndini kunnu ikki kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika, men kunnu skjótast inn fyri Føroya Rætt. Freistin hjá landsstýrismanninum ella umsitingarmyndugleikanum sbrt. § 25 at skjóta mál inn fyri Føroya Rætt er, innan 6 mánaðir eru farnir, frá at landsstýrismaðurin ella umsitingarmyndugleikin er kunnaður um avgerðina.

Stk. 2. Ummæli frá landsstýrismanninum ella umsitingarmyndugleikanum til kærunevndina skal vera avgreitt innan 4 vikur. Kærunevndin kann í serligum førum leingja freistina at geva ummæli.

Stk. 3. Kærunevndin hevur 3 limir, ein umboðandi løntakarar, ein umboðandi arbeiðsgevarar og ein formann, ið skal vera løgfrøðingur. Limirnir verða valdir av landsstýrismanninum fyri 4 ár í senn, tó so at nevndarlimur verður sitandi, til nýggjur er valdur.

Stk. 4. Samstundis verða vald varafólk, sum taka sæti í nevndini, tá limi berst frá.

Stk. 5. Nevndarlimir og varalimir fáa samsýning, sum landsstýrismaðurin ásetur."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2021, og er galdandi fyri foreldur at børnum, fødd ella ættleidd eftir, at løgtingslógin er komin í gildi.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Barsilsgrunnurin er undirfíggjaður, og tí er neyðugt við átøkum, sum gera, at grunnurin ikki verður tómur innan stutta tíð. Samstundis hevur samgongan sett sær sum mál at leingja rættin til barsilspening til í minsta lagi eitt ár. Eisini hevur samgongan sett sær fyri at minka talið av almennum nevndum og ráðum. Við hesi lógarbroyting verður fíggjarliga haldførið hjá Barsilsgrunninum tryggjað, samstundis sum rætturin til barsilspening verður longdur við 4 vikum, og kærunevndin hjá Barsilsskipanini verður løgd saman við kærunevndini hjá Arbeiðsloysisskipanini.

1.2. Galdandi lóggáva

Rættindini í barsilslógini eru tvíbýtt. Talan er um *barsilsfarloyvi*, ið gevur foreldrum rætt til at vera burtur frá arbeiðinum í sambandi við viðgongu, barnsburð og ættleiðing, og um *barsilspening*, ið verður veittur ein part av farloyvistíðarskeiðinum. Tá ið Barsilsskipanin varð sett á stovn í 2001, vóru bæði rætturin til barsilsfarloyvi og rætturin til barsilspening 24 vikur + tvær vikur serliga til pápan. Í 2002 varð barsilslógin broytt soleiðis, at barsils*farloyvi* varð longt til 52 vikur + tvær vikur serliga til pápan. Ætlanin var tá, at rætturin til barsils*pening* stigvíst skuldi leingjast til 52 vikur + tvær vikur serliga til pápan.

Barsilsfarloyvi

Sambært galdandi barsilslóg hevur kvinnan rætt til barsilsfarloyvi av viðgongu frá tí degi, hildið verður, at 4 vikur eru eftir til barnsburð, ella frá tí løtu hon við læknaváttan prógvar, at tað fyri fostur og/ella hana sjálva stendst heilsuvandi av at vera í starvinum, tó í fyrsta lagi frá tí degi at hildið verður, at 13 vikur eru eftir til barnsburð.

Eftir barnsburð hava foreldur rætt til barsilsfarloyvi í 56 vikur, sum tó skulu vera hildnar innan 52 vikur eftir barnsburð. Hetta letur seg gera, tí foreldrini hava rætt til at vera 4 vikur samstundis í barsilsfarloyvi. Býtið millum foreldrini er soleiðis, at mamman hevur rætt til 14 tær fyrstu vikurnar eftir barnsburð, meðan pápin hevur rætt til 4 vikur, sum skulu haldast innan 52 vikur eftir barnsburð, og sum kunnu haldast samstundis, sum mamman er í barsilsfarloyvi. Foreldrini hava síðan 38 vikur at býta sínámillum, sum tey ikki kunnu brúka samstundis.

Barsilspeningur

Kvinnan hevur rætt til barsilspening frá tí degi, mett verður, at 4 vikur eru eftir til barnsburð, ella frá tí løtu, hon við læknaváttan prógvar, at tað fyri fostur og/ella hana sjálva stendst heilsuvandi av at vera í starvinum, tó í fyrsta lagi frá tí degi, mett verður, at 8 vikur eru eftir til barnsburð.

Eftir barnsburð hevur kvinnan rætt til barsilspening í 44 vikur innan fyrstu 52 vikurnar eftir barnsburð. Faðirin at barninum hevur rætt til barsilspening í 4 vikur innan fyri tær fyrstu 52 vikurnar eftir barnsburð. Av teimum 44 vikunum hjá mammuni kunnu foreldrini í staðin fyri velja, at faðirin at barninum skal vera heima hjá barninum og fáa barsilspening í upp til 30 vikur eftir 14. viku eftir barnsburð.

Tvey ella fleiri børn undir sama barnsburði og ov tíðliga fødd børn

Fáa foreldrini 2 ella fleiri børn undir sama barnsburði, verða 4 vikur lagdar afturat teimum 30 vikunum við barsilspeningi, sum foreldrini kunnu býta sínámillum. Foreldur, sum fáa tvíburar

ella fleiri børn undir sama barnsburði, hava rætt til barsilsfarloyvi samsvarandi við tíðina, tey hava rætt til barsilspening.

Verður barn ella børn fødd áðrenn 32. viku í viðgonguni, verða 8 vikur lagdar afturat teimum 30 vikunum við barsilspeningi, sum foreldrini kunnu býta sínámillum. Foreldur, sum fáa barn ella børn áðrenn 32. viku í viðgonguni, hava rætt til barsilsfarloyvi samsvarandi við tíðina, tey hava rætt til barsilspening.

Barsilsgjaldið
Gjaldið hjá teimum gjaldskyldugu er 0,71% av gjaldsgrundarlagnum. Tey gjaldskyldugu eru øll, sum móttaka A-inntøku, sum hava fulla skattskyldu í Føroyum, og sum hava fylt 16 ár, men ikki 67 ár, og øll, sum rinda A-inntøku í Føroyum. Gjaldið verður kravt av øllum A-inntøkum, sum tey gjaldskyldugu móttaka ella rinda, tó við nøkrum undantøkum so sum pensjónir, summar skattskyldugar almannaveitingar og A-inntøka til avmarkaða skattskyldu undir FAS-skipanini. Gjaldið fellur til gjaldingar samstundis, sum tey gjaldskyldugu rinda ella móttaka A-inntøku.

Fíggjarligt haldføri
Tá ið barsilslógin varð broytt 1. januar 2015, varð rætturin til barsilspening longdur við 6 vikum, úr 38 vikum upp í 44 vikur. Fyri at fíggja broytingarnar varð barsilsgjaldið samstundis hækkað við 0,09 prosentstigum úr 0,62% upp í 0,71%.

Ábøtur vórðu eisini gjørdar á Barsilsskipanina 1. januar 2018, 1. mars 2018 og 1. juni 2019, tá ið ávikavist rætturin til barsilspening varð longdur við tveimum vikum, eftirlønargjaldið lagt oman á barsilspeningin og rætturin til barsilspening aftur longdur við tveimum vikum. Tá varð ikki mett, at tað var neyðugt at hækka barsilsgjaldið, tí at nýttu framrokningarnar vístu, at øktu útreiðslurnar rúmtust innan táverandi fíggjarorku hjá Barsilsgrunninum. Nú vísir tað seg tó, at Barsilsgrunnurin gav undirskot upp á góðar 6 mió. kr. í 2019, og at hetta undirskot við verandi gongd økist til áleið 10 mió. kr. í 2020. Góðar 11 mió. kr. vóru í Barsilsgrunninum við árslok 2019, og fer grunnurin sostatt væntandi at tømast innan langa tíð, um ikki munagóð átøk verða gjørd beinanvegin.

Framskriving av Barsilsskipanini 2019-2026								
Ár	**2019**	**2020**	**2021**	**2022**	**2023**	**2024**	**2025**	**2026**
Lógarbundin inngjøld								
Frá persónum	68,7	72,1	73,2	74,3	75,4	76,5	77,7	78,8
Frá arbeiðsgevarum	73,2	76,9	78,0	79,2	80,4	81,6	82,8	84,1
Tilsamans	**141,9**	**149,0**	**151,2**	**153,5**	**155,8**	**158,1**	**160,5**	**162,9**
Lógarbundnar útreiðslur								
Til persónar	94,6	104,4	105,9	107,5	109,1	110,8	112,4	114,1
Eftirløn til persónar	5,1	6,3	7,4	8,6	9,8	11,1	12,4	13,7
Til arbeiðsgevarar	41,9	42,0	42,6	43,3	43,9	44,6	45,2	45,9
Eftirløn til arbeiðsgevarar	2,2	2,5	3,0	3,5	4,0	4,5	5,0	5,5
Sosial gjøld (arbeiðsgevaragjøld)	2,0	2,1	2,1	2,2	2,2	2,2	2,2	2,3
Tilsamans	**145,8**	**157,2**	**161,1**	**165,0**	**169,0**	**173,1**	**177,3**	**181,5**
Útreiðslur til umsiting (TAKS)	2,4	2	2	2	2	2	2	2
Úrslit (við verandi treytum)	**-6,34**	**-10,26**	**-11,86**	**-13,52**	**-15,22**	**-16,98**	**-18,78**	**-20,63**

Framskrivingin í talvuni omanfyri byggir á verandi inn- og útgjøld. Vøksturin í inn- og útgjøldum verður leysliga mettur til 1,5% frá 2021 og fram.

Høvuðsorsøkin til, at nýttu fortreytirnar til framrokningarnar ikki hildu, er, at endaligi kostnaðurin av longda vikutalinum í 2018 ikki vísti seg fyrr enn út á árið 2019. Nýtt lógaruppskot varð samtykt á vári í 2019, áðrenn kostnaðurin av økta vikutalinum frá 2018-lógaruppskotinum sást aftur í útgjøldunum hjá Barsilsskipanini. Barsilsskipanin metir, at hvør økt vika kostar umleið 3 mió. kr. árliga.

Serliga tyngjandi er tó broytingin í 2018, har lógarásetta eftirlønargjaldið varð lagt oman á barsilsútgjaldið. Eftirlønargjaldið økist árliga við 1 prosentstigi og er nú á 6%. Eftirlønargjaldið kostar Barsilsgrunninum umleið 9 mió. kr. í 2020, og kostnaðurin av hesum gjaldi økist umleið 1,7 mió. kr. við hvørjari árligari øking í eftirlønargjaldinum sambært eftirlønarlógini. Hartil er at siga, at yvirskipað hevur verið ein øking í fólkatali og lønarlagi í Føroyum, sum hevur verið skeiklað á tann hátt, at økingin í útgjøldum hevur verið størri enn økingin í inngjøldum.

Kærunevndin hjá Barsilsskipanini
Sambært galdandi barsilslóg kunnu avgerðir eftir lógini ella reglum, settar sambært lógini, kærast til landsstýrismannin innan 4 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið fráboðan um avgerðina. Landsstýrismaðurin hevur tó brúkt heimildina í lógini til at leggja kærumyndugleikan til ein annan fyrisitingarligan myndugleika. Kærunevndin hjá Barsilsskipanini er sett á stovn við kunngerð nr. 39 frá 14. juni 2004 um kærunevnd hjá barsilsskipanini. Avgerðirnar hjá kærunevndini eru endaligar innan fyrisitingina.

Kærunevndin hevur tríggjar limir, ein umboðandi løntakarar, ein umboðandi arbeiðsgevarar og ein formann, ið skal vera løgfrøðingur. Limirnir verða valdir fyri 4 ár í senn, tó so at nevndarlimur verður sitandi til nýggjur er valdur. Samstundis verða vald varafólk, sum taka sæti í nevndini, tá limi berst frá. Kærur skulu latast kærunevndini innan 4 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið fráboðan um avgerðina. Nevndarlimir og varalimir fáa samsýning, sum landsstýrismaðurin ásetur. Landstýrismaðurin útvegar kærunevndini skrivstovuhálp. Kærunevndin hjá Barsilsskipanini er ein nevnd undir Føroya Kærustovni.

Kærunevndin hjá Arbeiðsloysisskipanini er eisini ein nevnd undir Føroya Kærustovni og hevur í høvuðsheitum somu treytir sum kærunevndin hjá Barsilsskipanini. Einastu munirnir eru, at ásett er í ALS-lógini, at ummæli frá Arbeiðsloysisskipanini til kærunevndina skal vera avgreitt innan 4 vikur; tó so at kærunevndin kann leingja freistina í serligum førum. Eisini er ásett, at freistin hjá Arbeiðsloysisskipanini at skjóta mál inn fyri Føroya Rætt er, innan 6 mánaðir eru farnir frá, at Arbeiðsloysisskipanin er kunnað um avgerðina. Onki er ásett um samsýning til nevndarlimirnar ella skrivstovuhjálp.

Tá ið kærunevndirnar skulu veljast, er mannagongdin, at landsstýrismaðurin biður fakfeløg og arbeiðsgevarafeløg um tilmælir til limir, sum kunnu umboða ávikavist løntakarar og arbeiðsgevarar. Í roynd og veru eru tað somu persónar, ið manna báðar kærunevndirnar.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Lógaruppskotið hevur trý endamál. Fyrsta er at leingja rættin til barsils*pening* til eitt ár. Hetta hevur verið ætlanin við Barsilsskipanini síðani 2002, tá ið barsils*farloyvið* varð longt úr 24 vikum (+2 vikur serliga til faðirin) til 52 vikur (+2 vikur serliga til faðirin). Seinna endamálið er at hækka barsilsgjaldið, soleiðis at Barsilsgrunnurin kann bera seg og gjalda barsilspening til løntakarar og arbeiðsgevarar. Barsilsgrunnurin hevur verið undirfíggjaður, og tí er neyðugt

at hækka barsilsgjaldið. Triðja endamálið er at leggja kærunevndina hjá Barsilsskipanini saman við kærunevndini hjá Arbeiðsloysisskipanini.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Lógaruppskotið hevur við sær, at rætturin til barsilspening verður longdur úr 48 vikum til 52 vikur eftir barnsburð. Tað merkir, at foreldur fara at hava rætt til barsilspening í tilsamans eitt ár eftir barnsburð. Velja foreldrini at fáa barsilspening samstundis í 4 vikur, verða tað 4 aðrar vikur innan 52 viku tíðarskeiðið, har foreldrini ikki fáa barsilspening.

Tær 4 vikurnar við barsilspeningi, sum koma afturat við hesum lógaruppskotinum, verða lagdar afturat felagskvotuni. Tað merkir, at mamman hevur rætt til barsilspening í 14 vikur eftir barnsburð, pápin hevur rætt til barsilspening í 4 vikur eftir barnsburð, meðan foreldrini fara at kunna deila 34 vikur við barsilspeningi sínámillum. Foreldur at børnum, ið verða fødd áðrenn 32. viku í viðgonguni og foreldur, ið fáa tvey ella fleiri børn undir sama barnsburði, fáa eisini 4 vikur lagdar afturat felagskvotuni. Ongin broyting verður gjørd viðvíkjandi ættleiðingar-foreldrum. Hesi hava, sum er, rætt til barsilspening í 52 vikur eftir, at tey hava fingið barnið.

Barsilsgjaldið verður hækkað úr 0,71% upp í 0,86% 1. januar 2021, tá ið lógaruppskotið kemur í gildi. Hetta hevur við sær, at Barsilsgrunnurin kann bera útreiðslurnar av økta vikutalinum við barsilspeningi umframt útreiðslurnar av tvungna eftirlønargjaldinum, sum eftir verandi eftirlønarlóg hækkar við einum prosentstigi um árið, til tað er 12% í 2026. Útreiðslurnar av økta vikutalinum tyngja ikki Barsilsskipanina fyrr enn í 2022.

Kærunevndirnar hjá Barsilsskipanini og Arbeiðsloysisskipanini verða lagdar saman til eina og somu kærunevnd. Hetta hevur við sær, at fakfeløg og arbeiðsgevarafeløg fjórða hvørt ár skulu geva landsstýrismanninum tilmæli til limir til eina kærunevnd í staðin fyri tvær.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Stundir hava ikki verið at senda lógaruppskotið til ummælis hjá hoyringarpørtum. Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur tó kunnað Føroya Arbeiðsgevarafelag og Fakfelagsráðið um innihaldið í uppskotinum.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Framrokningar vísa, at Barsilsskipanin er undirfíggjað við góðum 10 mió. kr. í ár og knøppum 12 mió. kr. í 2021. Undirskotið veksur á hvørjum ári fram til 2026 orsakað av, at eftirlønin hækkar við einum prosentstigi um árið fram til 2026 sambært eftirlønarlógini. Sí talvuna í broti 1.2. undir yvirskriftini *Fíggjarligt haldføri*.

Við hesi lógarbroyting verða 4 vikur við barsilspeningi lagdar aftrat rættinum til barsilspening, soleiðis at samlaða vikutalið við barsilspeningi kemur upp á 52 vikur eftir føðing. Hendan broyting økir útgjøldini úr Barsilsskipanini við umleið 12 mió. kr. árliga. Av tí at broytingin fær gildi fyri foreldur at børnum, sum eru fødd ella ættleidd, eftir at lógin kemur í gildi, fara útreiðslurnar fyri tær 4 vikurnar ikki at síggjast í útgjøldunum hjá Barsilsskipanini fyrr enn í 2022.

Sum er, er barsilsgjaldið 0,71% av øllum útgoldnum og móttiknum A-inntøkum. Lógaruppskotið leggur upp til, at barsilsgjaldið hækkar við 0,15 prosentstigum til 0,86% 1. januar 2021, tá ið lógaruppskotið kemur í gildi. Framskrivingin vísir, at við at hækka barsilsgjaldið upp til 0,86%, verður haldførið hjá Barsilsskipanini tryggjað í nøkur ár, soleiðis at Barsilsgrunnurin kann fíggja bæði leingingina av rættinum til barsilspening og hækkandi eftirlønargjaldið. Sí talvuna niðanfyri.

Ætlaða lógarbroytingin økir sostatt barsilsinngjaldið við umleið 31 mió. kr. árliga frá 2021, tá hædd er tikin fyri vanligari framskriving av inngjaldsvøkstri.

Framskriving av Barsilsskipanini 2019-2026 við 4 vikum eyka og hækkaðum barsilsgjaldi								
Ár	**2019**	**2020**	**2021**	**2022**	**2023**	**2024**	**2025**	**2026**
Lógarbundin inngjøld								
Frá persónum	68,7	72,1	88,7	90,1	91,4	92,8	94,2	95,6
Frá arbeiðsgevarum	73,2	76,9	93,6	95,0	96,4	97,9	99,3	100,8
Tilsamans	**141,9**	**149,0**	**182,3**	**185,0**	**187,8**	**190,6**	**193,5**	**196,4**
Lógarbundnar útreiðslur								
Til persónar	94,6	104,4	105,9	119,5	121,3	123,1	125,0	126,9
Eftirløn til persónar	5,1	6,3	7,4	9,6	10,9	12,3	13,7	15,2
Til arbeiðsgevarar	41,9	42,0	42,6	43,3	43,9	44,6	45,2	45,9
Eftirløn til arbeiðsgevarar	2,2	2,5	3,0	3,5	4,0	4,5	5,0	5,5
Sosial gjøld (arbeiðsgevaragjøld)	2,0	2,1	2,1	2,4	2,4	2,5	2,5	2,5
Tilsamans	**145,8**	**157,2**	**161,1**	**178,2**	**182,5**	**186,9**	**191,4**	**196,0**
Útreiðslur til umsiting (TAKS)	2,4	2	2,2	2	2	2	2	2
Úrslit (við 4 vikum eyka)	**-6,34**	**-10,26**	**19,04**	**4,85**	**3,30**	**1,70**	**0,06**	**-1,64**

Tá ið Barsilsgrunnurin varð settur á stovn í 2015, var ætlanin, at grunnurin skuldi hava eitt fæ, ið skuldi tryggja, at grunnurin kundi standa í móti vanligum sveiggjum í inn- og útgjøldum. Grunnurin hevur verið undirfíggjaður seinastu árini, og við árslok 2020 er innistandandi brúkt. Til at røkka upprunaliga endamálinum leggur lógaruppskotið upp til, at grunnurin kann byggja upp innistandandi á umleið 27 mió.kr. fram til 2026, tá inn- og útgjøld væntandi verða í javnvág aftur. Í 2026 verður væntandi tørvur á at meta um, um støddin á barsilsgjaldinum framvegis tryggjar javnvág í inn- og útgjøldum í Barsilsgrunninum.

Av tí at barsilsgjaldið verður hækkað, skulu bæði land og kommunur sum arbeiðsgevarar rinda tað meira í barsilsgjaldi av øllum A-inntøkum, ið land og kommunur útgjalda.

Ætlaða broytingin krevur somuleiðis, at broytingar skulu gerast í elektronisku skipanunum, sum Barsilsskipanin brúkar. Við støði í líknandi broytingum, sum áður eru gjørdar í elektronisku skipanunum hjá Barsilsskipanini, verður mett, at broytingin fer at kosta millum 150.000 kr. og 262.500 kr.

Almannaverkið veitir stuðul vegna barnsburð eftir forsorgarlógini til persónar, ið ikki hava rætt til útgjald úr Barsilsskipanini. Stuðul verður veittur í sama vikutal, sum barsilslógin leggur upp til. Leingjan av rættinum til barsilspening fer sostatt væntandi at hava øktar útreiðslur við sær fyri Almannaverkið.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið hevur nakað av umsitingarligum avleiðingum við sær hjá TAKS, sum umsitur Barsilsskipanina.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Av tí at rætturin til barsilspening eftir barnsburð verður longdur úr 48 vikum upp í eitt ár, er tað sannlíkt, at løntakarar fara at gera brúk av hesum rættinum og fara at vera burtur frá arbeiðsplássinum í eitt longri tíðarskeið enn áður í sambandi við barnsburð.

Harafturat hevur lógaruppskotið ta avleiðing fyri vinnuna, at arbeiðsgevarar skulu rinda meira í barsilsgjaldi. Av hvørjari A-inntøku, sum arbeiðsgevararnir rinda arbeiðstakarunum í løn, skulu teir rinda 0,86% í barsilsgjaldi frá og við 2021 í mun til 0,71%, sum er gjaldið nú.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Uppskotið hevur avleiðing fyri løntakarar og øll, ið móttaka A-inntøku. Persónar, ið móttaka A-inntøku og skulu í barsilsfarloyvi, fara við lógaruppskotinum at fáa rætt til at vera í barsilsfarloyvi við barsilspeningi í eitt ár eftir barnsburð. Mamman eigur 14 vikur, pápin eigur 4 vikur, meðan 34 vikur vera at deila millum foreldrini. Hagtøl úr Føroyum og hinum Norðurlondunum vísa, at pápar fara í barsilsfarloyvi so leingi, sum barsilsfarloyvið við lóg er markað til teir. Avleiðingin av lógaruppskotinum kann tí væntast at verða, at mammur fara at vera í barsilsfarloyvi í 48 vikur í mun til 44 vikur, sum nú.

Harafturat hevur lógaruppskotið ta avleiðing fyri tey, ið móttaka A-inntøku, at tey skulu rinda meira í barsilsgjaldið. Barsilsgjaldið, ið skal rindast av øllum móttiknum A-inntøkum, verður hækkað úr 0,71% upp í 0,86% frá og við 2021.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Norðurlendski sáttmálin um almannatrygd er viðkomandi fyri barsilslógina. Tó hevur hetta lógaruppskotið onga broyting í mun til sambandið millum barsilslógina og norðurlendska sáttmálan um almannatrygd.

2.9. Markaforðingar
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur markaforðingar við sær, eins og lógaruppskotið ikki verður mett at tarna flytførinum hjá einstaka borgaranum.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sekir ella pantiheimildir. Lógaruppskotið ger ikki onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur við sær, at barsilsgjaldið á 0,71%, ið verður rindað av øllum útgoldnum og móttiknum A-inntøkum, hækkar upp í 0,86% frá og við 2021. Onnur orsøkin til at barsilsgjaldið verður hækkað, er at tryggja haldførið í Barsilsgrunninum. Hetta er neyðugt, fyri at grunnurin ikki skal tømast við árslok. Hin orsøkin til at barsilsgjaldið verður hækkað, er fyri at fíggja tær 4 vikurnar við barsilspeningi, ið verða lagdar afturat við hesum lógaruppskotinum. Víst verður til frágreiðingina undir pkt. 2.1. omanfyri.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hækkar barsilsgjaldið, ið verður goldið av øllum útgoldnum og móttiknum A-inntøkum. Hóast barsilsgjaldið eyðsæð er eitt gjald, er tað ikki eitt gjald, ið verður goldið sum ein samsýning fyri eina ítøkiliga tænastu ella veiting. Víst verður til viðmerkingarnar omanfyri undir pkt. 2.1. og 2.11.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið leggur ikki skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar, so sum upplýsingarskyldu, skrásetingarskyldu ella krøv um loyvi.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin ella annan myndugleika.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur aðrar avleiðingar, enn omanfyri tilskilað.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Ja	Nei	Ja	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Ja	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1

Nr. 1
Í § 1, stk. 3, 2. pkt. í barsilslógini stendur m.a., at barsilsfarloyvið skal vera tikið innan fyri tær fyrstu 52 vikurnar eftir barnsburð, tó við tilvísing til tey føri, har rætturin til barsilspening kann gerast longri enn 52 vikur. Av tí at rætturin til barsilspening hjá foreldrum, ið fáa tvey ella fleiri børn undir sama barnsburði, við hesum lógaruppskotinum verður longdur úr 52 vikum upp í 56 vikur, er neyðugt at gera broyting í § 1, stk. 3 í barsilslógini, soleiðis at foreldrini hava rætt til at vera í barsilsfarloyvi eins leingi, og tey hava rætt til at fáa barsilspening.

Nr. 2
Ásetingin hevur við sær, at mamman hevur rætt til barsilspening í 48 vikur eftir barnsburð í mun til 44 vikur eftir verandi lóg. Rætturin til barsilspening skal vera nýttur innan fyri tær fyrstu 52 vikurnar eftir barnsburð.

Nr. 3
Ásetingin hevur við sær, at rætturin til barsilspening, ið foreldrini kunnu býta sínámillum, verður longdur úr 30 vikum upp í 34 vikur. Hesar 34 vikurnar verða tiknar av teimum 48 vikunum við barsilspeningi, sum mamman hevur rætt til sambært broytingini í nr. 2 omanfyri.

Nr. 4
Hetta er ein fylgibroyting av, at rætturin til barsilspening eftir barnsburð verður longdur úr 48 vikum upp í 52 vikur.

Nr. 5
Hetta eru fylgibroytingar av, at felagskvotan við barsilspeningi, sum foreldrini kunnu deila, verður hækkað úr 30 vikum til 34 vikur.

Nr. 6
Barsilsgjaldið verður hækkað úr 0,71% til 0,86%. Tað merkir, at øll, sum móttaka og rinda A-inntøku skulu gjalda 0,86% av A-inntøkuni í mun til 0,71%, sum nú er. Gjaldið verður hækkað bæði fyri at venda undirskotinum í Barsilsgrunninum og fyri at fíggja tær 4 vikurnar við barsilspeningi, sum vera lagdar afturat í hesum lógaruppskotinum.

Nr. 7
Yvirskriftin yvir § 25 verður broytt frá *Umsitingarmyndugleiki* til *Umsitingarmyndugleiki og kærur*. Hetta verður gjørt, fyri at yvirskriftin eisini skal fevna um nýggju ásetingina í § 25 a.

Nr. 8
§ 25 í barsilslógini snýr seg um umsitingarmyndugleikan eftir lógini. Stk. 3 og 4, sum snúgva seg um, at landsstýrismaðurin er kærumyndugleiki, og at hann kann leggja kærumyndugleikan til annan fyrisitingarligan myndugleika, verða hervið strikaðar. Sí serligu viðmerkingarnar til nr. 9 niðanfyri.

Nr. 9

Sambært galdandi barsilslóg kunnu avgerðir eftir lógini ella reglum, settar sambært lógini, kærast til landsstýrismannin innan 4 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið fráboðan um avgerðina. Landsstýrismaðurin hevur tó brúkt heimildina í lógini til at leggja kærumyndugleikan til ein annan fyrisitingarligan myndugleika. Kærunevndin hjá Barsilsskipanini er sett á stovn við kunngerð nr. 39 frá 14. juni 2004 um kærunevnd hjá barsilsskipanini. Avgerðirnar hjá kærunevndini eru endaligar innan fyrisitingina.

Kærunevndin hevur tríggjar limir, ein umboðandi løntakarar, ein umboðandi arbeiðsgevarar og ein formann, ið skal vera løgfrøðingur. Limirnir verða valdir fyri 4 ár í senn, tó so at nevndarlimur verður sitandi til nýggjur er valdur. Samstundis verða vald varafólk, sum taka sæti í nevndini, tá limi berst frá. Kærur skulu latast kærunevndini innan 4 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið fráboðan um avgerðina. Nevndarlimir og varalimir fáa samsýning, sum landsstýrismaðurin ásetur. Landstýrismaðurin útvegar kærunevndini skrivstovuhálp. Kærunevndin hjá Barsilsskipanini er ein nevnd undir Føroya Kærustovni.

Kærunevndin hjá Arbeiðsloysisskipanini er eisini ein nevnd undir Føroya Kærustovni og hevur í høvuðsheitum somu treytir sum kærunevndin hjá Barsilsskipanini. Einastu munirnir eru, at ásett er í ALS-lógini, at ummæli frá Arbeiðsloysisskipanini til kærunevndina skal vera avgreitt innan 4 vikur; tó so at kærunevndin kann leingja freistina í serligum førum. Eisini er ásett, at freistin hjá Arbeiðsloysisskipanini at skjóta mál inn fyri Føroya Rætt er, innan 6 mánaðir eru farnir frá, at Arbeiðsloysisskipanin er kunnað um avgerðina. Onki er ásett um samsýning til nevndarlimirnar ella skrivstovuhjálp.

Tá ið kærunevndirnar skulu veljast, er mannagongdin, at landsstýrismaðurin biður fakfeløg og arbeiðsgevarafeløg um tilmælir til limir, sum kunnu umboða ávikavist løntakarar og arbeiðsgevarar. Í roynd og veru eru tað somu persónar, ið manna báðar kærunevndirnar.

Landsstýrið hevur sett sær fyri at minka talið av almennum nevndum og ráðum. Tí verður í nýggjari § 25 a ásett, at avgerðir eftir lógini ella reglum settum sambært lógini kunnu kærast til kærunevndina hjá Arbeiðsloysisskipanini og Barsilsskipanini. Treytirnar hjá kærunevndini vera tær somu, sum eru galdandi fyri kærunevndirnar, sum nú eru. Í mun til galdandi reglur, fær Barsilsskipanin eina freist á 4 mánaðir at geva kærunevndini ummæli og 6 mánaðir at skjóta mál fyri Føroya Rætt.

Av tí at somu persónar manna báðar kærunevndirnar, og setanarskeiðið hjá báðum nevndum er til 1. juni 2021, heldur kærunevndin fram sum higartil, men við broyttum navni.

Til § 2

Áseting um gildiskomu og hvør er fevndur av lógini. Løgtingslógin kemur í gildi 1. januar 2021 og er galdandi fyri foreldur at børnum, fødd ella ættleidd eftir, at lógin er komin í gildi.

Talan er um nýggj rættindi, ið verða galdandi fyri barnsburðir og ættleiðingar, eftir at lógin er komin í gildi. Við at hava føðidag/ættleiðingardag sum skeringsdagin fyri at verða fevnd av lógarbroytingunum, slepst undan, at tað verður tilvildarligt, hvørji foreldur verða fevnd av lógini, alt eftir hvussu tey hava lagt sær barsilsfarloyvið til rættis.

Løgtingið hevur áður ásett, at broytingar í barsilslógini eru galdandi fyri foreldur at børnum, fødd ella ættleidd sama dag, sum løgtingslógin er komin í gildi, ella seinni, og fyri foreldur, sum eru í skipanini, og sum fáa útgjald eftir § 9. Tá hevur eisini verið ásett, at løgtingslógin var

galdandi fyri tey foreldur, hvørs útgjaldsskeið eftir § 9 var endað, men har seinasta útgjaldið frá Barsilsskipanini ikki var útgoldið. Hetta hevur elvt til nógva umsiting hjá Barsilsskipanini, av tí at barsilspeningurin hjá øllum teimum, sum vóru í Barsilsskipanini, skuldi roknast av nýggjum. Eisini førdi tað til, at foreldur, sum vóru farin aftur til arbeiðis, men sum ikki høvdu fingið seinasta útgjaldið úr Barsilsskipanini, fóru aftur í barsilsfarloyvi so leingi, sum lógarbroytingin loyvdi. Hetta kundi gera tað trupult hjá arbeiðsgevarum at leggja arbeiðið til rættis, tí foreldur brádliga fóru aftur í barsilsfarloyvi. Harafturat kann tað virka eitt sindur tilvildarligt, hvør ið varð fevndur av lógarbroytingunum, tí tað var ikki føðingin/ættleiðingin, ið var skeringsdagurin, men tað valdaðist, hvussu foreldrini høvdu lagt sær barsilsfarloyvið til rættis, um tey komu í ta heldigu støðu, at tey vórðu fevnd av lógarbroytingunum.

Henda lógarbroyting fevnir ikki um sama bólk, sum tær seinastu lógarbroytingarnar í barsilslógini hava fevnt um. Í staðin verður føðingardagurin ella ættleiðingardagurin avgerandi fyri, um foreldrini eru fevnd av lógarbroytingini.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, tann 29. september 2020

Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur